





*Kann nýggi kandidaturin hjá Javnaðarflokkinum til løgtingsvalið, Gerhard Lognberg, bygdaráðsformaður í Skopun koppa einum av verandi tingmonnum í oynni, Páll á Reynatúgvu og Eyðun Viderø , so kann hann eisini vera avgerandi fyri, hvør kemur at skipa samgongu eftir valið*

# Sandoyggin kann avgera lagnu hjá samgongu

**Bæði uppstillingin og orðaskiftið til fólkatingsvalið geva greiðar ábendingar um, at hetta eisini er ein upphiting til løgtingsvalið. Tað minir ikki sørt um eina politiska "bumbu", at bygdarráðsformaðurin og stemmuslúkarin við seinasta bygdarráðsvalið í Skopun, Gerhard Lognberg, nú hevur gjørt av at stilla upp til løgtingsvalið fyri størsta andstøðuflokkin, Javnaðarflokkin. Tann avgerðin kann broyta javnvágina eftir eitt komandi løgtingsval**

VAL
*Jan Müller*

Gongdin í Føroyum í sambandi við løgtingsval hevur víst, at smáu valdømini kunnu hava avgerandi ávirkan á, hvussu ein samgonga kemur at síggja út. Hetta sóu vit m.a. við seinasta løgtingsval, tá Javnaðarflokkurin misti mannin í Sandoynni, og Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin fingu báðar menninar. Tað var m.a. viðvirkandi til, at núverandi samgongan fekk meiriluta. Tá freistin herfyri varð úti at stilla upp valevni til fólkatingsvalið var eitt heilt nýtt navn millum mongu valevnini, sum man kanska beit serliga merki í. Bygdaráðsformaðurin í Skopun, Gerhard Lognberg, sum skoraði meira enn 100 atkvøður til bygdaráðsvalið, hevur gjørt av at fara upp í landspolitikk og hevur sum fyrsta stig á hesi leið hevur hann valt at stilla upp til fólkatingsvalið. Í samrøðu við Sosialin í dag avdúkar hann fyrstu ferð alment, at hann fer eisini at stilla upp til løgtingsvalið.

Og nú tá tað oftani er so javnt millum flokkarnar í Sandoyar valdømi og tingsamansetingin higani oftani hevur verið tungan á vágskálini, tá fleirtal skal finnast at skipa landsstýri kundi verið spurt, um Sandoyggin enn einaferð kann vera við til at broyta samlaðu politisku myndina eftir eitt komandi løgtingsval.

Vit hava spurt samfelagsfrøðingin Jógvan Mørkøre, hvussu stóran týdning hann heldur smáu valdømini hava fyri skipan av samgongu? Hann vísir á, at tað sjálvandi er ringt at taka eitt einstakt valdømi fram og siga, at tað hevur størri týdning fyri endaliga úrslitið enn onnur. Tí í tí samanhanginum kann ein atkvøða hvar tað skal vera í landinum vera avgerandi. Men hann dylur tó ikki fyri, at smærri valdømini eru serliga áhugaverd. T.d. eydnaðist tað við seinasta løgtingsval Fólkaflokkinum at fáa umboð í trimum av teimum smærri valdømunum, Sandoy, Vágunum og í Norðstreymoy og kann man siga, at hesi tí hava verið avgerandi fyri skipan av samgonguni. Av tí at hesi valdømi eisini eru lutfalsliga "bílig" valdømi so noyðast allir flokkar at hugsa um at standa seg væl í teimum minstu valdømunum.

Hetta er so eisini ein orsøk til at allir flokkarnir royna stilla sterkt upp til fólkatingsval og bæði taka verandi tingmenn og nýggj andlit fram longu nú. Tað er so uppstillingin hjá Javnaðarflokkinum í Sandoynni eitt dømi um.

Spurningurin er so, um ein bygdaráðsformaður í eini stórari bygd, sum ongan tingmann hevur í dag, kann koppa ein av tingmonnunum, sum eru valdir í grannabygdini og harvið broyta javnvágina millum samgongu og andstøðu eftir valið! Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur kann bara staðfesta, at flytur tú ein mann sum t.d. í Sandoynni merkir tað reelt, at tað eru tveir á muni, hugsa vit um skipan av eini samgongu. .

Hann vísir annars á, at Sandoyggin altíð hevur verið spennandi til løgtingsval, tí har eru bara tríggir flokkar, sum kunnu fáa teir báðar tingmenninar. Í løtuni er Sandoyggin rættiliga trygg hjá Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum. Samfelagsfrøðingurin hevur sum so onga viðmerking til, um hetta kann broytast til komandi løgtingsval. – Men vit hava sæð fyrr, hvussu javnt tað kann ganga á í Sandoynni.



# Kós móti Løgtinginum

**Borgarstjórin í Skopun, sum er uppstillaður til fólkatingsvalið, ætlar sær eisini at vera á komandi løgtingsvallistanum hjá Javnaðarflokkinum í Sandoy**

VALEVNI
*Edvard Joensen*



*Tað er tekniskt gjørligt at fáa undirsjóvartunnil undir Skopunarfjørð, og tí fari eg at virka fyri í landspolitikki, sigur Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun, sum ætlar sær á Løgting. Ein undirsjógvartunnil fer at hava øgiliga menning við sær á Sandoynni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Skopun:** Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun, metir uppstillingina til fólkatingsvalið at vera eina lopfjøl til at gerast valevni til løgtingsvalið komandi. Hann dylur ikki fyri, at hann ætlar sær á Løgting.

– Sandoyggin hevur brúk fyri breiðari umboðan á Løgtingi, sigur skopuningurin, sum er hálvur heimasandsmaður, og leggur eina við, at hann ætlar at umboða alt valdømið, sum eisini umfatar Skúvoy og Dímun, um tað kemur so langt, at hann gerst løgtingsmaður eftir eitt komandi løgtingsval.

Tá hann verður spurdur um eitt ítøkiligt dømi, hann heldur, hevði komið valdøminum til góðar, ivast hann ikki í, at loyvi eigur at verða givið til aling á Sandsvág. Tað er ikki rætt at tengja tað málið saman við lívfiskastøðini í Skopun, heldur hann, tí tey bæði støðini liggja so fjart hvørt frá øðrum, at har skuldi ikki borið til at ført sjúku ímillum, um ræt veðrur atborið.

Gerhard Lognberg er 51 ára gamal. Skopuningur um ein háls, hóast mamman var heiman av Sandi, greiðir hann frá.

Vit sita inni á kommunuskrivstovuni í Skopun. Kaffi og rundstykki eru á borðinum, og uttan fyri hoyrist vindur, meðan regnið dýkir á rútin.

Teistin hevur júst ført okkum um Fjørðin. Hetta frálíka skipið, sum borgarstjórin er sera glaður fyri, men einki hevur ímóti at skifta út kortini.

– Við ein undirsjóvartunnil, tá tann tíð kemur, sigur hann, og leggur dent á, at tað væl letur seg gera tekniskt við einum tunnli undir Skopunarfirði. Hann hevur kannað tað, sigur Gerhard Lognberg.

## Áhugi

Tað er av politiskum áhuga, at hann hevur latið seg stillað upp til fólkatingsvali, greiðir Gerhard Lognberg frá.

– Tað var Jógvan Adolf Johannesen, sum heitti á meg um at stilla upp til val, sigur hann. Jógvan Adolf hevur umboðað okkum væl í fleiri ár, men er nú givin í politikki.

Jú, borgarstjórin tók við áheitanini og játtaði at stilla upp til fólkatingsvalið, hóast hann heilt realistiskt heldur, at løgtingsvalið verður tað meira áhugaverda.

Men eitt fólkatingsval er avgjørt eitt gott høvi at síggja, hvussu ein flýtur, sigur hann.

Hetta er fyrstu ferð, Gerhard Lognberg stillar upp til annað val enn kommunuval. Men í kommunalpolitikki hevur hann aftur fyri drúgvar royndir.

Síðan 1984 hevur hann sitið í bygdarráðnum í Skopun út í eitt. Tvær tær fyrstu seturnar var hann næstformaður og hevur síðan 1992 verið bygdarráðsformaður og nú borgarstjóri í Skopuna Kommunu. Til seinasta kommunuval fekk hann 110 persónligar atkvøður. Tað er umleið triðja hvør atkvøða, sum valrætt hevur í kommununi.

Í ringastu tíð í bæði Skopunar og Føroya søgu hevur hann staðið á odda fyri kommununi, sum var fyri einum øgiligum vambakasti, tá kreppan rakti, men sum nú er á veg upp aftur við fullari ferð.

– Tær royndar, sum gjørdar eru í kommunalpolitikki hesi árini, eiga at koma til góðar, tá ein ætlar sær upp í landspolitikk, sigur Gerhard Lognberg.

## Flakavirkið

– Tað var púra rætt av okkum at forða fyri, at Føroya Fiskavirking fekk nakað sum helst út av flakavirkinum í síni tíð. Vit vóru teir fyrstu, og seinni fylgdu fleiri eftir, minnir Gerhard Lognberg á.

At skopuningar slóu garð um flakavirkið og blokerðau allar dyr, var uttan iva beinleiðis orsøkin til, at tað yvirhøvur verður arbeitt á virkinum í dag, sigur borgarstjórin.

– Alt, sum inni var av virði, hevði helst verið flutt til onnur virki hjá Føroya Fiskavirking, og vit høvdu staðið eftir við eini ruin, sum eingin hevði verið áhugaður í.

Men vit fingu gjørt tað so, at ikki so frægt sum telefaxið fór úr húsinum, og tað gjørdi so aftur, at teir, sum nú leiga virkið, dugdu at síggja møguleikar í at fá tað í gongd aftur. Nú gongur tað væl og gevur nógv arbeiði í bygdini.

– Tað var ein púra røtt avgerð, sum vit nú fáa ágóðan av, sigur Gerhard Lognberg.

Tó ásannar hann, at vantandi barnaansingarmøguleikarnir í Skopun kanska hava virkað nakað darvandi fyri, at fólk flyta aftur í sama mun, sum tey fluttu burtur.

Men tann trupulleikan er kommunan nú í ferð við at loysa, nú ein nýggjur ansingarstovnur, sum hýsir bæði vøggustovu og barnagarði, verður bygdur í Skopun.

## Tunnil og havn

Gerhard Lognberg dylur iki fyri, at hann vil hava undirsjóvartunnil undir Skopunarfjørð.

Tað letur seg gera tekniskt og fer at hava øgiligan framburð við sær fyri oynna sum heild, sigur hann.

At tað kan fara at gera, at tann nógv umrødda Skopunar Havn ongantíð fer at verða liðug, tí peningajáttanin fellur burtur, tá eingin ferjulega verður har, væntar hann ikki fer at verða tann stóra vanlukan.

– Teir fyrimunir, sum ein undirdjóvartunnil fer at geva oynni, viga ríkiliga upp í móti tí, sum havnin møguliga missir, er borgarstjórin í Skopun sannførdur um.

Men skúyvoyingar skulu hava eina nýtiliga havn, um lív skal vera lagað har úti, heldur Gerhard Lognberg fram.

Bátahylurin, sum gjørdur er í Skúvoy, er ikki nóg væl frágingin. Í grundini er talan um byggisjusk, vilja skúvoyingar vera við. Teir halda, at teir hava fingið eina havn, sum er meira enn ein metur grynnri enn tann, teir hava goldið fyri.

– Júst tær teknisku umstøðurnar kenni eg ikki so nágreiniliga, men eg havi sjálvur sæð og upplivað, at havnarviðurskiftini í Skúvoy eru ikki í lagi, sigur Gerhard Lognberg.

Hóast Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun og fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins, hevur sínar avgjørdu hugsanir um, hvørjum hann vil arbeiða fyri, um hann gerst landspolitikari fyri Sandoynna, sum hann ætlar, er hann so mikið realistiskur, at hann veit, at heilt so lætt verður tað kortini ikki.

– Politikkur er at gera semjur, og teimum fari eg at arbeiða miðvíst fram í móti, sigur hann. Tí tað er við semjum, at úrslitini fáast. Ikki við samanbrestum.



*Næstan 20 ár í kommunalpolitikki er góð barlast at hava við sær, tá ein ætlar sæ upp í landspolitikk, sigur borgarstjórin í Skopun*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Sandoyggin hevur brúk fyri einum javnaðarmanni á tingi, sum fer at arbeiða fyri allari oynni, sigur Jógvan Adolf Johannesen*

*Mynd:Jens Kristian Vang*

# Rætt at gevast nú

**Jógvan Adolf Johannesen, fyrrverandi løgtingsmaður fyri Sandoyar valdømi, metir, at tað er rætt av honum at gevast nú og lata nýtt fólk taka við**

VAKTARSKIFTI
*Edvard Joensen*

Jógvan Adolf Johannesen er farin burtur úr politikki eftir at hava sitið á tingi í næstan 10 ár út í eitt. Hann varð ikki afturvaldur við seinasta val, hóast bara 20 atkvøður mangladu í, og fer ikki at stilla upp aftur til komandi val.

– Eg meti hetta vera røttu løtuna at gevast. Eg havi fylt 66 ár, um eg livi, tá val verður aftur, og heilsan er ikki líka góð, sum hon hevur verið, greiðir Jógvan Adolf Johannesen frá.

Tað stendur so vánaliga til við rygginum, sigur hann, at tað gongur illa at dansa føroyskan dans. Og tá soleiðis er, stendur í grundini púra einki til hjá fyrrverandi landsformanninum hjá dansifeløgunum í Føroyum.

Tað er nú ikki so galið kortini, at maðurin púra er fyri ongum. Hann hevur ivaleyst at triva í sum reiðari á partrolaranum Eysturbúgvanum.

Tað var hart at vera tingmaður í nítiárunum, sigur Jógvan Adolf Johannesen. Kreppan legði landið lamið, og í okkara valdømi gjørdist hon ein ólukka. Stríðið fyri at fáa latið flakavirkini upp aftur var bæði hart og tungt, men tað eydnaðist kortini, vísir hann á. Í dag verður arbeitt bæði í Skopun og á Sandi.

– Tað er so avgjørt »Sandoyarloysnini« fyri at takka, sigur Jógvan Adolf. Sandoyarloysnin var í stuttum ein stuðul upp á tríggjar milliónir krónur, sum vórðu settar av til at fáa virkini í gongd aftur fyri.

Eitt mál, sum Jófvan Adolf arbeiddi dúgliga fyri, var at fáa berghol til Dals. Men tað eydnaðist ikki, áðrenn hann gavst í politikki.

Tað hevur verið frammi at seta 800.000,- krónur av til eina kanning í hesum sambandi. Men báði núverandi sandoyartingmenninir vóru ímóti, sigur Jógan Adolf, og nú er ikki rúm á fíggjarlógini fyri hesum málinum.

Jógvan Adolf Johannesen vónar inniliga, at Javnaðarflokkurin aftur fær tingmann í Sandoynni til komandi val. Og hann heitir staðiliga á sandoyingar um at vlja ein javnaðarman, sum vil arbeiða fyri allari oynni.